## Trygdarlendu tvær ferðir



Eitt flogfar hjá danska flogfelagnum Cimber Air trygdarlendi ikki minni enn tvær ferðir í Kastrup í gjárkvøldið. Flogfarið skuldi til Luksenburg við 35 ferðafólkum. Stutt eftir at tað var farið á flog, vístu trygdarljósini brek við lendingarútgerðini, og flogskiparin valdi at venda aftur. Ein tíma seinni fór flogfarið aftur á flog, men nú vóru trupulleikar við úthurðini, og enn eina ferð mátti flogfarið venda aftur til Kastrup. Cimber Air sigur tilburðin vera heilt óvanligan, men at ferðafólkini vóru ongantíð í lívsvanda.

## Grønlandsbanken avlop

Grønlandsbanken slapp væl burtur úr kreppuárinum 2008. Úrslitið fyri skatt var 71,8 milliónir krónur, sum kortini er væl minni enn metárið 2007, tá bankin hevði góðar 112 milliónir krónur í avlopi fyri skatt. Stjórin, Martin Kviesgaard, sigur við blaðið Sermitsiaq, at hann er væl nøgdur við úrslitið, og at bankin bæði kann og vil veita lán. Martin Kviesgaard sigur, at tann vanligi bankaraksturin gav væl av sær í 2008, men at luttøkan í bankapakkanum frá danska statinum var dýr.

# Jacob Vestergaard fekk kalda móttøku

**Politikarar í samgongu og andstøðu taka kaldliga ímóti ætlanini hjá Jacobi Vestergaard, landsstýrismanni, um at kanna møguleikarnar fyri at leggja øll skipini í eitt felags reiðarí í Suðuroy**

BYGDAMENNING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Soðið hjá Jacob Vestergaard er óluksáliga tunt.

Tað halda fleiri politikarar, bæði í samgonguni og í andstøðuni.

Serliga nógvar meiningar hevur hansara egna flokkur, Fólkaflokkurin.

Í hinari greinini her á síðuni reisir Bjarni Djurholm, tingmaður, iva um ætlanina hjá sínum egna landsstýrismanni og spyr, um talan er um atkvøðufiskarí.

Ein annar floksfelagi, Poul Michelsen, staðfesti, at sporini við Strandferðsluni ræða og hann vildi hava landsstýrismannin at veita trygd fyri, at onki verður gjørt í óðum verkum.

- Vit mugu hava eina vissa civilisatión í hesum. Argumentatiónin má vera trygg og hon má hava politiskt kjølfesti.

Ein triði floksfelagi, Heðin Zachariasen heldur, at hetta eigur at verða viðgjørt nærri.

Annars heldur hann, at Strandferðslan er eitt dømi um ein almennan stovn sum nú virkar betri enn hann kanska nakrantíð hevur gjørt, eftir at hann er fluttur út á bygd.

- Men tað skal viðgerast í samgonguni og grundgevingarnar skulu vera haldgóðar.



*Ætlanin hjá Jacob Vestergaard at leggja tey trý almennu reiðaríini, Vaktar- og Bjargingatænastuna, Magnus Heinason og Strandferðsluna saman fyri at fáa bíligan rakstur, hevur fingið politikarar upp úr stólinum og nú er kampur um at fáa Vaktar- og Bjargingartænastuna til Klaksvíkar ella til Eysturoynna. Her liggja Tjaldrið og magnus Heinason lið við lið*

### Flytast til Klaksvíkar

Fjórði fólkafloksmaðurin, Jákup Mikkelsen, vísti á, at í nógv ár hevur verið tosað um at leggja Vaktar- og Bjargingartænastuna í ein sjóvinnudepil í Klaksvík og tað kundi eisini verið ein loysn

Rodmund Nielsen úr Fólkaflokkinum, helt, at grundgevingin er tunn, men hann tekur undir við tankanum um at effektivisera.

Kári á Rógvi úr Sjálvstýrisflokkinum, heldur, at vit mugu ikki forsøma eina skilagóða samanlegging og eitt skilagott bygdarmenningartiltak, bara tí at tað passar embætisverkinum best og bara tí at topparnir helst vilja búgva í Havn.

Høgni Hoydal úr Tjóðveldinum, heldur, at tað er átaluvert at málið kemur fram uttan nakra viðgerð.

Og hann vissaði Løgtingið um, at Jacob Vestergaard ger álvara av ætlanini tá ið valið nærkast aftur, sama, hvat onnur í samgonguni siga.

Tórbjørn Jacobsen úr Tjóðveldinum helt lítið um ætlanina hjá landsstýrismanninum um at nøkur skip nú skulu keypa "møtrikkar og skrúvubløð saman", sum hann tók til.

Og hann kallaði hetta lokalpolitikk av ringasta slag

Ein annar tjóðveldismaður, Heini O. Heinesen, heldur, at hetta er heilt hol í høvdið, tí tað var ov langt hjá skipunum at sigla av Norðhavinum til Suðuroy. Annars vísti eisini hann til ætlanina um at flyta fiskivinnuumsitingina til Klaksvíkar.

### Flytast í Eysturoy

Alfred Olsen staðfestir, at málið er ikki viðgjørt politiskt og hann helt, at vit hava ringar royndir av at samanleggja stovnar.

Annars heldur hann, at mest natúrliga staðið í Føroyum at flyta Vaktar- og Bjargingartænastuna, er inn í Eysturoy. Men hann kom ikki nærri inn á, hví hann helt tað.

Bill Justinussen og Karsten Hansen úr Miðflokkinum siga at royndirnar av samanleggingum hava verið ivasamar og Bill nevndi Kringvarpið og Vinnuháskúlin sum tvey eru ræðandi dømi. Kortini heldur hann at tað er skilagott at flyta alment virksemi runt í landinum, har tað er skilagott.

- Tað kann vera, at okkurt talar fyri, at tað er skilagott í hesum føri. Karsten Hansen sigur, at tað ber væl til at keypa í felag ber væl til, uttan at leggja stovnar saman

Einasta javnaðarfólk, ið tók orðið, var Katrin Dahl Jacobsen og hon helt, at soðið er øgiliga tunt, tí hetta snýr seg bara um at hvør dregur til sítt øki.

# Krevur greitt svar frá partamanninum

**Bjarni Djurholm vil hava at vita um hansara egni landsstýrismaður, Jacob Vestergaard, bara er úti eftir at fiska atkvøður, hóast vandi er fyri, at almennir stovnar fara í knús**

RATIONALISERING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað vakti miklan ans í Løgtinginum tá ið Sosialurin mánadagin visti at siga, at landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum kannar møguleikarnar fyri at leggja raksturin av skipunum hjá Vaktar- og Bjargingartænastuni og fiskirannsóknarskipinum, Magnusi Heinasyni, saman við Strandferðsluni í Suðuroy, so at øll almenn skip verða umsitin á sama stað.

Hann metir, at hetta kann geva stór-rakstrarfyrimunir í sambandi við mongdaravsláttur, tá ið vørur og tænastur av ymsum slagi skulu keypast og tá ið tilboð skulu fáast frá undirveitarum av ymsum slagi. Tað skal eisini gera tað lættari hjá manningum at skifta ímillum skipini.

### Atkvøðufiskarí, ella...

Bjarni Djurholm, tingmaður og floksfelagi hjá landsstýrismanninum, er ein av teimum, sum er ørkymlaður av ætlanini.

Hann reisti málið í Løgtinginum í gjár, har hann vildi hava landsstýrismannin at greiða frá, hví hann arbeiðir við at flyta vaktarskipini og Magnus Heinason til Suðuroyar?

Hann vildi hava at vita, um talan er um eitt ynski um at rationalisera ella um tað bara er fyri at flyta virksemi úr Tórshavn í útjaðaran.

Hann fór enntá so langt, sum til at spyrja, um hetta bara er fyrsta stigi av fleiri, ella um hetta bara er fyri at vinna sær atkvøður, hóast tað kann syndra stovnar sum annars virka.

Bjarni Djurholm heldur, at grundgevingin lítið um grundgevingina.

Tað má merkja, at manningarnar skulu í mesta mun vera úr sama øki og at provianteringin somuleiðis skal fyriskipast av veitarum í ávísum øki.

- Hetta er politikkur, sum annars varð lagdur á hyllina fyri fleiri árum síðani, sigur Bjarni Djurholm.

Hann heldur tí, at sakliga grundgevingin er tunn og ber mest brá av at vera uppfunnin fyri at hava eina grundgeving, heldur enn at byggja á haldgóðan botn.

### Rationalisering

Jacob Vestergaard sigur, at hann hugsar hvønn dag um, hvussu almenni raksturin kann rationaliserast og, um, hvussu vit fáa sum mest burtur úr skattaborgarans pengum.

Ein partur av hesum er at lúka dupultfunktiónir burtur, har tað ber til og tað kann vera ein fyrimunur at hava eitt alment reiðarí, heldur enn trý, sum vit hava nú.

Hann sigur, at tey hava tosað leyðsliga um møguleikan at hava eitt alment reiðarí, so at allur almennur skiparakstur er undir sama stovni.

Men hann legði dent á, at enn hevur málið ikki verið til veruliga viðgerð.

Hann vildi ikki svara upp á, um hetta bara var atkvøðufiskarí.

- Landsstýrið fiskar ikki eftir atkvøðum og landsstýrið syndrar ikki almennar stovnar, segði landsstýrismaðurin.

Men hann leggur afturat, at onki verður gjørt, fyrrenn tað er viðgjørt væl og virðiliga.